# Fólkið fyri frælsi og fl

**Fólkafundurin á ólavsøku leyp væl vælupplagdur beint út í tunga stríðið hjá føroyingum gjøgnum yvirflóð av fløtaskúmi móti frælsi**

FÓLKAFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Mergjaðar røður, speiskir skemtarar, stimbrandi frælsissangir og eitt framúr vakurt summarkvøld í idylliskum føroyskum umhvørvi. Alt var, sum tað skuldi vera á fólkafundinum á doktaragrund úti á Reyni í gjárkvøldið. Og so eitt sindur afturat. Tí rættiliga skjótt lyftu bæði røður og skemt seg upp um tað, vit øll hava hoyrt fyrr við prikum og høggum – ikki minst móti okkum modernaðum hallelujaglobalistum sum ikki síggja frælsi fyri berum fløtaskúmi – við øðrum orðum, vit forvandu og forkelaðu føroyingar, sum halda, frælsi merkir fleiri tindatempul frá Jákup á Dul.



*Trongu gøturnar úti á Reyni vóru um at bresta av væluppløgdum fundarfólki á fólkafundinum á doktaragrund í gjár*

## Stórbýrarrúsur í fløtaskúmi

Í øllum førum sambært innovatiónsmanninum Bergur Rosenkranzt (alias Annfinnur Heinesen) sum var komin at geva fundarfólkinum nøkur innovativ hugskot um, hvussu føroyingar kunnu branda seg sjálvan av nýggjum við at krøkja seg í globalu pipelinjuna og selja idéeir og produktir, sum ongin visti av, at tey høvdu brúk fyri. Soleiðis kunnu vit gerast parur av innovatiónssamfelagnum, sum løgmaður júst hevur røtt um í sjálvari løgmansrøðuni, vissaði harra Rosenkrantz um.

Sum eitt tað fyrsta skulu vit øll flyta til Havnar eins og løgmaður og Tobbi, sum hava kent stórbýarrúsin í æðrunum og nú eru vorðnir bundnir av honum. Bygdafólki sleppur eisni at vera í Havn ein part av árinum. Í øllum førum til tey um summarið skulu sendast út aftur á bygd, har tey skulu vera statistar í einum totalteatri, ið vísir turistum veruligu armóðina hjá føroyingum.

Men ongin orsøk er at missa móti, helt Rosenkrantz. Globala fløtakakan liggur beint fyri okkara fótum, og nú er bara at eta so nógv av henni, sum vit orka. Jú fleiri føroyingarr vit verða, jú størri verður fløtakakan.



*Bergur Rosenkrantz (alias Anfinnur Heinesen) frøddist um sína føroysku húgvu í innovativum sniði*

## Yvirupphitaður galskapur

Heilt so bjartskygdur var Johan í Kollafirði ikki. Hann byrjaði við at takka fyri, at so nógv tímdu at vera føroyingar hesa løtuna, sjálvt um tað leingi ikki hevur verið nøkur serlig grund til at vera føroyingur.

Tað er, sum við føroyskum politikki – sum minnir mest um tosið um konufólk umborð á einum saltfiskatrolara – also tos um, tað sum ikki er, hugleiddi Johan, sum annars hevði lisið fleiri bøkur í seinastuni um serføroyska yvirupphitaða galskapin. Og gullkornini, hann hevði funnið í verkum sum Kejserens nye klær, Prinsessen på ærten og Pigen med svovlstikkerne vóru ikki so fá.

## Vit og betrivit

Nýskjaldrini hjá Carl Jóhan Jensen eru eftirhondini ein



*Forkvinnan í Unga Tjóðveldi, Barbara Holm, bjóðaði vælkomin í einum heldur øðrvísi føroyskum búna*